tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Hvar er virðingin fyri fólkaræðinum?

## *Oddagrein*

SÁRINI í samgonguni eru lekt á hesum sinni. Hetta skuldi í hvussu er „løgni“ tíðindafundurin í Tinganesi í vikuni vátta. Tó at úttalilsini hjá tjóðveldistingmanni í blaðnum í dag ber boð um nakað heilt annað. Gjáramorgunin bedýraði Sjálvstýrisflokkurin, at hann hevur framvegis fult álit á samgongini og politiska setningi hennara, og flokkurin segði seg vóna, at floksfelagarnir gjørdu tað sama.

MEN tað er væl skilligt, at Sjálvstýrisflokkurin tók ákærurnar ímóti Helenu Dam á Neystabø upp á hægsta floksstigi. Hon er jú skuldsett fyri at lúgva tilvitað, eins og hon er skuldsett fyri at fyrireika tey mál, hon leggur fyri Tingið, út av lagi vánaliga. Málini hava verið tunn og piðað, skrivaði ein samgongufelagi hjá Sjálvstýrisflokkinum millum jólanna.

Og nakað er um tað, men hetta gloymdi Anfinn Kalsberg, løgmaður, tá hann eftirtíðindafundin mánadagin gav samgonguflokkunum av grovfílini fyri ikki at hava nakra floksdisiplin ella nakra veruliga organisatión.

ORSØKIN er hon, at landsstýrisflokkarnir fáa mál hjá samgonguni at viðgera, men at flokkarnir venda ikki aftur við nøkrum viðmerkingum ella broytingum til uppskotini hjá landsstýrinum. Tí verður landsstýrisflokkaviðgerðin í nevndunum. Í sambandi við pensjónsmálið í Trivnaðarnevndini.

MEN í hesum viðfangi skal verða viðmerkt, at løgmaður hevur ikki nóg stóra virðing fyri fólkaræðinum, tí tingið og tingnevndirnar eru ikki bara samgonguflokkarnir, men eisini andstøðuflokkarnir - og teir skulu eisini virðast. Somuleiðis skal viðgerðin í nevndunum - í hesum føri Trivnaðarnevndini - taka ta tíð, tað tekur at viðgera eitt mál.

SANNLEIKIN um alt pensjónsmálið er, at tað hevur haltað við fyrireikingunum frá byrjan. Sjálvandi skuldu sjálv pensjónslógin og lógin, sum ásetir pensjónsupphæddirnar, verið lagdar fram samstundis - tær hanga jú saman. Ella í øllum førum skuldi ásetingarlógin verið løgd fram á ólavsøku, sum landsstýrismaðurin lovaði, tá pensjónlógin varð viðgjørd síðsta vár. Men hon kom ikki Tingið fyrr enn síðst í november, og tá vóru ongar konsekvensútrokningar við. Tí kann ikki sigast annað, enn at málið var illa fyrireikað, og tað er skilligt, at formaðurin í Trivnaðarnevndini iðrar seg um, at hann í heila tikið lat málið verða skrumblað gjøgnum Tingið.

SAMGONGAN vil hava almenningin at halda, at hon hevur funnið stevið aftur - men ikki kann sigast, at landsstýrið ella Tingið liva upp til alt, sum varð sagt og lovað, tá nýggj stýrisskipanarlóg varð gjørd, og tingmenn fingu lønarhækkan. ***Sosialurin***



# Finnur og Páll høvdu allar møguleikar at koma við broytingum

*Løgtingsmenninir Kristian Magnussen og Hans Pauli Strøm siga, at tjóðveldisumboðini í Trivnaðarnevndini høvdu allar møguleikar at koma við broytingum, áðrenn pensjónslógirnar vórðu samtyktar. Finnnur Helmsdal sigur, at teir vórðu drignir upp á tráð…*

EIRIKUR LINDENSKOV

– Samgongutingmenninir eiga einsamallir alla ábyrgdina av vánaliga úrslitinum av nýggju fólkapensjónini.

Hetta siga tingmenninir hjá Javnaðarflokkinum, Hans Pauli Strøm og Kristian Magnussen í hvassari viðmerking í blaðnum í dag.

– Tað er ikki landsstýriskonan, sum hevur ábyrgdina av, at hetta ófullfíggjaða og vánaliga lógaruppskotið varð skrumblað ígjøgnum og gjørdist løgtingslóg. Hinvegin er tað løgtingsmeirilutin, samgongutingmenninir, sum fuskaðu eitt lógaruppskot – sum eingin kendi avleiðingarnar av – ígjøgnum, siga javnaðartingmenninir.

**– Vit hava ávarað…**

Tingmenninir undrast á, at tað júst eru hesir somu tingmenn (Finnur Helmsdal og Páll á Reynatúgvu, blðm.) sum nú koyra so hart á Helenu Dam á Neystabø.

– Teir hava sjálvir havt allar møguleikar at rættað teir nógvu skeivleikarnar og óhepnu avleiðingar av lógini.

– Vit hava ávarað teir ferð eftir ferð. Vit ráddu teimum til ikki at fuska uppskotið ígjøgnum, men at taka okkum alla ta tíð, sum kravdist, fyri at geva uppskotinum ta neyðugu viðgerðina í Trivnaðarnevndini, siga javnaðartingmenninir, sum báðir eru limir í løgtingsins trivnaðarnevnd.

Javnaðartingmenninir vísa eisini á, at hóast tjóðveldistingmenninir, sum eisini limir í Trivnaðarnevndini, leikaðu í, so vóru teir sera positivir í teirraa meirilutaáliti til sjálva pensjonslógina í vár. Tá søgdu teir:

*”Lyklaorðini til hesa nýggju pensjónslóggávu er einfald- og nútímansgerð, umframt tillaging til føroysk viðurskifti.”*

Hetta halda javnaðartingmenninir lítið um.

– Og hvat siga teir nú um somu lóg? Óðamannaverk og lortablæur. Men ikki fyrr enn teir hava hoyrt umboð fyri brúkararnar kolldøma lógina og kalla hana kryplaða og eitt makkverk.

Nú hava vit so hoyrt og sæð, at teir aftur einaferð eru flongdir upp á pláss av løgmanni og øllum landsstýrinum.

**Virða ikki egin ráð**

Hans Pauli Strøm og Kristian Magnussen halda tað eisini vera alla átalu vert, at landsstýrið ikki hirðir at spyrja egin ráð og nevndir, so sum Eldraráðið, Ráðið fyri Brekað o. o viðkomandi ráð, so sum Landsfelag Pensjónistanna og Meginfelag teirra Brekaðu, til ráðs.

– Eingin av hesum hevur havt møgueleikar at seta seg 9inn í hesar stórbroytingar ella koma við viðmerkingum, tíansheldur at verða tikin upp á ráð, siga teir.

Forkvinnan í Ráðnum fyri Brekað vísti herfyri í Sosialinum á, at ráðið als ikki hevði sæð pensjónslógaruppskotið áðrenn tað fór í tingið, hóast Helena Dam á Neystabø fleiri ferðir hevur sagt, at lógaruppskotið hevur verið viðgjørt í ráðnum.

Kristian Magnussen og Hans Pauli Strøm harmast eisini um, at samgongumeirilutin hevur gjørt hetta málið til eitt stríð millum andstøðu og samgongu – til eitt óverdugt klandursmál.

**Helena komin alt ov seint við málinum**

Finnur Helmsdal stendur fast við allar ákærurnar móti Helenu Dam á Neystabø. Hann heldur tað vera skeivt av løgmanni at tveita ábyrgdina yvir á tinglimir. Formaður Tjóðveldisfloksins, Heini O. Heinesen, er púra samdur við Finni Helmsdal. Hann vísir á, at vit í Føroyum hava ráðharraábyrgd, og tí er tað landsstýriskvinnan, ið hevur fulla ábyrgd av óskilinum.

Finnur Helmsdal ásannar, at hann átti at gjørt óvusligari vart við ónøgd sína um málið undir politisku viðgerðini. Men hann varð – eins og floksfelagar hansara rigin upp á tráð av landsstýriskvinnuni.

– Málið varð skrumblað ígjøgnum og nú sæst úrslitið, sigur Finnur Helmsdal og vísir á, at orsøkin til rumblið er, at málið kom alt ov seint fyri tingið.

Lesið annars meira á síðunum 4-6 og á síðu 8.

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**
**www.sosialurin.fo**



# 750 metrar millum Gorm og hval

*Eingin endi fekst á hvalin á sandinum í Sørvági, tá Grom týsdagin royndi at fáa hvalin til havs. Hann liggur 650 metrar frá marbakkanum - og Gormur hættar sær ikki nærmari bakkanu enn 100 metrar*

ÓLAVUR Í BEITI

Tá ið Sosialurin hevði skiparan á »Gormi« í telefonini mikumorgunin, lá vaktarskipið á Klaksvík. Týsdagin var »Gorm« á Sørvági at kanna umstøðurnar viðvíkjandi hvalinum, og hvussu hann kundi fáast av aftur Sandinum, har hann liggur væl og virðiliga boraður í sandinum, men tá varð einki gjørt, tí eingin endi var umborð á vaktarskipinum, sum rakk.

Tað er nú soleiðis vorðið, at illa slepst til hvalin fyri marbakkanum, og so liggur hvalurin óvanliga langt »heima« á Sandinum, sum sagt verður í bygdini.

Skiparin á »Gormi«, Julian Martin Juul, sigur, at frá marbakkanum til hvalin eru einir 650 metrar, og tá ið vaktarskipið ikki fær komið nærri marrubakkanum enn einar 100 metrar, verður frástøðan einar 750 metrar millum skip og hval, og so langan enda hava teir ikki umborð á skipinum. Tað longsta er eitt togverk uppá 220 metrar, sigur Julian Martin Juul.

– Og heldur ikki í allari oynni var gjørligt at fáa nakran enda, sum var so langur, at hann rakk, leggur skiparin á »Gormi« aftrat.

**15,60 metrar langur**

Ætlanin er tá at fáa hvalin av aftur Sandinum í Sørvági, men nær tað verður er ikki gott at siga.

Vaktarskipið »Gorm« hevur nú útgerðina tøka, so nú er bert at bíða eftir, at veður verður at fáa endan á hvalin og toga hann langt út aftur á hav, haðani hann helst er komin.

Ein skúlaflokkur í Sørvági hevur verið og mált hvalin, og sambært hesum er hann 15,60 metrar langur. Einki hevur verið at hoyrt um, hvat hetta er fyri ein hvalur og heldur ikki er lætt at meta um tað, tí hann er nakað illa farin.



*Eingin nóg langur endi var í Vágum, og tí fekk vaktarskipið Gormur ikki hálað hvalin av sandinum í Sørvági. Hvalurin liggur 650 metrar frá marbakkanum - og ikki er ráðiligt hjá skipi at koma nærmarin bakkanum enn 10 0 metrar*

# Røkke vann í USA

*Teir tríggir amerikansku sjómenninir sum hava kravt endurgjald frá Røkketrolaranum ”American Triumph” vunnu ikki fram í rættarsalinum.*



JÓGVAN HUGO GARDAR, OSLO

Kjell Inge Røkke og felag hansara, Aker RGI, kunnu í fyrstu atløgu taka tað púra róligt.

»American Triumph«, sum síðani fyri jól hevur ligið við bryggju, meðan rætturin viðgjørdi kravið, er nú leyslatin aftur, og kann fara til fiskiskap aftur.

Tríggir amerikanskir sjómenn, sum hava verið við ”American Triumph” kravdu endurgjald fyri at trolarin líka síðáni 1987 skal hava fiskað við einum loyvi, sum er givið á skeivum grundarlag.

Tann amerikanski dómarin vísti burtur grundarlagnum fyri kravinum. Nú umhugsa teir tríggir sjómenninir, um teir skulu skjóta avgerðina inn fyri hægri rætt.

Val av UMBOÐSRÁÐI
fyri S/F Tryggingarfelagið Føroyar

**Í februar mánaði ár 2000 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Tryggingarfelagið Føroyar. Valið er galdandi í fýra ár.**

Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna innan 1. februar 2000.

Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum.

**Allir felagsins tryggingartakarar eru limir í felagnum.**

Tryggingarfelagið Føroyar er eitt sínámillum tryggingarfelag, ið teknar øll sløg av skaðatryggingum. Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi. Umboðsráðið velur nevnd felagsins. Afturat hesum velja starvsfólkini í felagnum nevndarlimir sambært ta til eina og hvørja tíð verandi lóg um tryggingarvirksemi.

Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavist 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni og øllum avgreiðslunum.

**Tórshavn, tann 4. januar 2000**

**S/F Tryggingarfelagið Føroyar**
**Stjórnin**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin, P.O.Box 329, FO-110 Tórshavn, Faroe Islands
Tel +298 345600, Fax+298 345601, www.trygging.fo, tf@trygging.fo

SANSIR · TEL 355 355